# Kunngerð nr. 89 frá 14. september 2006

**um**

**innlatingarfreistir av**
**sjálvuppgávu fyri roknskaparskyldug**

Við heimild í § 105, stk. 1 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður ásett:

§ 1. Seinasta freist fyri at lata inn sjálvuppgávu við roknskapi er 1. mai í álíkningarárinum.

§ 2. Seinasta freist fyri at lata inn sjálvuppgávu frá deyðsbúgvum, feløgum, felagsskapum v.m., smb. §1, stk. 1, nr. 7-17 og § 2 í skattalógini, er 1. juli í álíkningarárinum.

§ 3. Freistirnar sambært §§ 1 og 2 eru eisini galdandi fyri at lata inn ognaruppgerðir fyri avvarðandi inntøkuár.

§ 4. Økisskrivstovunum er tó heimilað, tá ið heilt serligar grundir eru til tess, s.s., deyði og sjúka, at leingja freistirnar sambært §§ 1 og 2, ein mánað í senn, tó ikki út um 15. august í álíkningarárinum.
Stk. 2. Treytin fyri, at freistin kann verða longd, er, at skrivlig umsókn verður send økisskrivstovunum í seinasta lagi 7 dagar, áðrenn freistin er úti, og at sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir fyri eldri ár eru innkomin til Toll- og Skattstovu Føroya.

§ 5. Sjálvuppgávan er roknað fyri at vera innlatin rættstundis, tá ið hon í seinasta lagi síðsta innlatingardag er fingin Toll- og Skattstovu Føroya ella latin í postin. Eisini ber til at senda sjálvuppgávuna við telduposti, sum pdf-fílur. Sama er galdandi viðvíkjandi roknskapi og ognaruppgerð.
Stk. 2. Fellur innlatingardagurin á ein leygardag ella sunnu- ella halgidag, verður innlatingardagurin fyrsti eftirfylgjandi gerandisdagur.

§ 6. Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2007. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 92 frá 19. november 1999 um innlatingarfreistir av sjálvuppgávu fyri roknskaparskyldug.